# Jarðfeingi raðfestir trygdina høgt

**TRYGD – Trygdarviðurskiftini í sambandi við boringar hava sera høga raðfesting, og soleiðis er eisini nú borað verður aftur á landgrunninum sigur Petur Joensen, stjóri á Jarðfeingi.**



**TRYGD**

*– Skuldi eitt óhapp hent er umráðandi, at skaði á fólk, umhvørvi, náttúru og tinglig virði verða avmarkað mest møguligt, sigur Petur Joensen, stjóri á Jarðfeingi*

Jan Müller

Sambært Útvarpinum hava fólk frá Jarðfeingi júst verið í Bruxelles og tosað um trygdina í sambandi við boringar í okkara parti av heiminum saman við níggju øðrum londum. Har fingu tey trygd fyri, at útgerð framvegis er tøk í Europa skuldi onkur dálkivanlukka hent av sama slag sum tann í USA. Á Jarðfeingi hava tey borið ótta fyri, at goymslurnar í Europa eru tómar eftir at øll útgerð er flutt til Meksikoflógvan visti útvarpið at siga frá nú um dagarnar

Petur Joensen sigur við Sosialin, at tað sjálvandi fyrst og fremst er uppgávan hjá oljumyndugleikum at hava reglur, sum so vítt møguligt byrgja upp fyri, at nakað óhapp hendir. Í øðrum lagi er uppgávan at avmarka neiligu avleiðingarnar av einum óhappi.

– Viðvíkjandi trygdarreglunum, so hava vit í Føroyum reglur, ið eru líkar teimum í londunum rundan um okkum. Regluverkið er eitt sokallað dynamiskt regluverk (á enskum goalsetting regulation) grundað á inn-aneftirlit, váðalýsingar og tilbúgving. Reglurnar byggja á ta grundreglu, at tey, ið standa fyri virkseminum, skulu ávísa fyri myndugleikunum, hvussu ætlanir eru lagdar at halda trygdarreglur soleiðis at virksemið verður útint forsvarliga.

### Útgerð er tøk

Jarðfeingisstjórin sigur víðari, at í hesum føri merkir tað, at tað eru ikki fastir standardir ásettir í regluverkinum, men ásetingarnar miðja meira ímóti, at loyvishavarar altíð skulu fylgja »best practice« í oljuvinnuni her um leiðir. Hetta fyri at trygdarkrøvini alla tíðina fylgja við menningini, heldur enn at lata gamlar standardir verða »hangandi« sum hann málber seg.

– Skuldi eitt óhapp hent kortini er umráðandi, at skaði á fólk, umhvørvi/náttúru og tinglig virði (í hesi raðfylgju) verða avmarkað mest møguligt. Tá er umráðandi, at tilbúgvingin er í lagi. Her á leiðum hava feløg t.d. avtalu um at hjálpa hvørjum øðrum við útgerð, skuldi tørvur verið á tí í samband við eitt óhapp. Tað er tí nógv útgerð tøk, og tað átti soleiðis ikki verið neyðugt at sett strangari krøv um tað.

Jarðfeingi hevur ikki í løtuni ætlanir um at broyta krøvini í samband við boringar. Hinvegin skal fyristøðufelagið, sum ein natúrlig avleiðing av vanlukkuni í Mexicoflógvanum, ávísa fyri Jarðfeingi sum myndugleika, at tey viðurskifti, ið møguliga hava viðvirkað til vanlukkuna, eru eftirmett og at hædd er tikin fyri teimum í teimum ætlanum, ið fyriliggja.

**Her á leiðum hava feløg avtalu um at hjálpa hvørjum øðrum við útgerð, skuldi tørvur verið á tí í sambandi við eitt óhapp**

Petur Joensen upplýsir, at Jarðfeingi hevur í fleiri ár verið við í millumtjóða samstarvi, har trygdarviðurskifti verða viðgjørd, og har m.a. umrøtt verður, um broytingar eiga at verða gjørdar í regluverkunum. Hetta tryggjar, at vit alla tíðina fylgja við á hesum øki.

*jan@sosialurin.fo*